LM-034/2025

Fíggjarmálaráðið
Teldupost: fmr@fmr.fo

Fylgiskjal 6

Tórshavn 3. oktober 2025

Hoyringarsvar til broytingar í eftirlønarlógini

LÍV takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið um broytingar í eftirlønarlógini.

LÍV fegnast um, at Fíggjarmálaráðið við hesum uppskoti hevur tikið atlit til avbjóðingar, ið felagið áður hevur víst á, og at lógin við hesum verður lættari at umsita.

Í viðmerkingunum til uppskotið undir 2.2 stendur fylgjandi:

> **2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
> Mett verður, at broytingarnar fara at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS. Fíggjarmálaráðið metir, at lógaruppskotið fer eisini at lætta um umsitingina av skattinum av pensjónsinngjøldum fyri kommununar. Orsøkin er, at verður lógaruppskotið samtykt, verður frameftir ikki neyðugt – eins og gjørt verður í dag í fyribilstíðarskeiðnum – at taka fyrst 40% í skatti av øllum inngjøldum, sum síðani út við eitt ár seinni verður regulerað eftir skattastiganum. Hetta fer frameftir at gera tað lættari hjá kommununum at meta um skattainntøkurnar.

Soleiðis sum vit lesa hesar viðmerkingar, so fer man við hesum uppskotinum aftur til at skulu gjalda 40% í skatti við inngjaldi fyri øll. Hetta merkir, at tey lágløntu, í mun til í dag, fara at missa upp til 10%-stig í eftirlønargjaldið. Hetta mælir LÍV frá at broyta, men at halda fast við verandi skipan.

Við undantakið av omanfyri nevndu viðurskiftum tekur LÍV undir við restina av ætlaðu broytingunum.

Vinarliga
Jan Jakobsen, stjóri